umhvørvisstovan

Landshandilin
Akranesgøta 11
110 Tórshavn

Argir, hin 2. oktober 2008
Málnr.: US-441-011/08/5
Tykkara málnr.:
Málsviðgeri: EE

# L O Y V I

Við heimild í grein 3 í løgtingslóg nr. 73 frá 10. mai 1994 um íløt til øl, mineralvatn og lidnar leskidrykkir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 47 frá 15. mai 2007 veitir Umhvørvisstovan við hesum:

**Loyvi nummar**
**EB 009**

**Loyvið fevnir um:**

Loyvi at selja og flyta inn mineralvatn og lidnar leskidrykkir í einnýtisíløtum, sum tilskilað

Argir, hin 2. oktober 2008

Jóhanna Olsen
Deildarleiðari

/

Eyð Eidesgaard
Umhvørvisviðgeri

# LOYVI AT SELJA OG FLYTA INN ØL, MINERALVATN OG LIDNAR LESKIDRYKKIR Í EINNÝTSLUÍLØTUM

**Loyvishavari**
Vísandi til § 3 í løgtingslóg nr. 73 frá 10. mai 1994 um íløt til øl, mineralvatn og lidnar leskidrykkir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 47 frá 15. mai 2007, umframt umsókn frá 29. august 2008 hevur Umhvørvisstovan veitt loyvi til:

| |
|---|
| Navn, bústaður, telefon og faks hjá persóni virki, felagi ella stovni:<br><br>Landshandilin<br>Akranesgøta 11<br>Postboks 17<br>110 Tórshavn<br>Tlf 31 13 85<br>Fax 31 35 56<br><br>Kontakt: Finn Rasmussen, tlf. 211385, finn@landshandilin.fo |

**Úrdráttir og íløt**
Loyvið er givið at selja og flyta inn teir úrdráttir í teimum íløtum, sum eru nevnd í talvuni niðanfyri:

| **Góðkendir úrdráttir:** | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Navn á úrdrátti** | **Slag av úrdrátti** | **Tilfar á ílati** | **Stødd á ílati** | **Merkt (mál)** |
| Shark | Orkudrykkur | Metal | 0,25 l | Danskt |

**Treytir**
- Loyvishavari skal halda ásetingarnar í løgtingslóg nr. nr. 73 frá 10. mai 1994 um íløt til øl, mineralvatn og lidnar leskidrykkir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 47 frá 15. mai 2007, og tær reglur sum verða gjørdar við heimild í hesi lóg.
- Loyvishavari skal framhaldandi skráseta nøgdina av innfluttum, seldum, móttiknum og avhendaðum íløtum, og skulu hesar upplýsingar saman við yvirliti yvir inn- og útgoldið pant, latast loyvismyndugleikanum árliga, tó fyrstu ferð 3 mánaðar eftir at loyvið er givið.
- Loyvishavari skal tola møguligar broytingar í treytunum, um eftirlitsmyndugleikin, grundað á serliga tær upplýsingar, ið loyvishavarin hevur skyldu at lata loyvismyndugleikanum, metir tørv verða á hesum, fyri at pant- og returskipanin skal virka á nøktandi hátt.

**Kunning**
- Avrit av hesum loyvi við atknýttum fylgiskjølum verður latið Tollmyndugleikunum.
- Yvirlit yvir loyvishavarar og úrdráttir verður lagt á heimasíðuna hjá loyvismyndugleikanum.
- Loyvið frítekur ikki loyvishavaran fyri at útvega møgulig onnur loyvi ella góðkenningar, ið kravdar eru sambært aðrari lóg.

**Kæruvegleiðing**
Hendan avgerð kann sambært grein 24 í løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg kærast til landsstýriskvinnuna við umhvørvismálum. Kæran skal sendast Umhvørvisstovuni, sum síðan sendir hana til landsstýriskvinnuna við umhvørvismálum saman við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er fýra vikur frá tí degi, loyvið er almannakunngjørt. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

**Hjálagt:**

**Fylgiskjal 1**
Løgtingslóg nr. 73 frá 10. mai 1994 um íløt til øl, mineralvatn og lidnar leskidrykkir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 47 frá 15. mai 2007.
**Fylgiskjal 2**
Kunngerð nr. 54 frá 31. mai 2007 um íløt, úrdráttir og pant.

**Avrit:** Taks, Postrúm 2151, FO-165 Argir